NØVN Í VIKUNI

# Gigga við Keldu níti ár

**Í morgin fyllir Gigga við Keldu í Klaksvík 90 ár. Hon er fødd á Kirkju í Fugloy. Bert 2 ára gomul, tá hon gjørdist faðirleys, varð hon send til Klaksvíkar at vera. Gigga býr í dag á Norðoya Røktarheimi. Hóast sjúku lættir hon við sínum ljósa og glaða lyndi um gerandisdagin hjá øllum, ið koma á hennara leið**

FØÐINGARDAGUR
*Rúna Sivertsen*

Sigga Malena Elisabeth Sofie Rasmussen, soleiðis varð hon doypt, men alt sítt lív hevur hon verði rópt Gigga. Foreldur hennara, Absolina og Hanus Rasmussen á Kirkju í Fugloy, fingu trý børn. Ein son, sum doyði bert 12 ára gamal og tvær døtur, Sigrid og Giggu. Tað var bara knapt ár millum systrarnar báðar.

Bert 2 ára gomul gjørdist Gigga faðirleys og varð send til Klaksvíkar at vera. Fyrst búði hon hjá Ellu og Malvinus í Vátutoft. Ella var mostur hennara. Men tá hon var 5 ára gomul, flutti hon norð á Stengurnar til Elspu og Joen Jacob Jabobsen.

Gigga sigur, at hon hevði tað ógvuliga gott hjá Elspu og Jóan Jakku.

Tá barnaár og skúli vóru lokin, fór hon sum flestu gentur tá út at tæna. Leiðin gekk suður til Havnar, har hon var arbeiðsgenta hjá millum øðrum Jens Mohr, Edward Mitens og dr. Lynge.

### Giftist Theodor við Keldu

Tá Gigga var um 20 ára gomul, kom Theodor við Keldu úr Leirvík til Klaksvíkar at arbeiða. Fyrst á posthúsinum og síðani í handlinum hjá Joen Jacob, sum var handilsmaður og hevði handil á Stongunum.

Skjótt rann saman millum Giggu og Theodor, men tað skuldu ganga heili seks ár, til tey í giftust.

Í 1937 flutti dr. Lynge aftur til Danmarkar. Tey vildu hava Giggu at koma við teimum niður, og tað tilboðið kundi hon ikki siga frá sær. Hon helt, at hon mátti sleppa at uppliva okkurt, áðrenn hon gifti seg.

Hon var arbeiðsgenta hjá teimum í Danmark í tvey ár, og tá hon í 1939 kom heimaftur, giftust hon og Theodor.

Gigga og Theodor fingu trý børn, Regin, Jógvan og Áslu. Regin býr í Munkebo á Fjóni, og Jógvan og Álsa búgva bæði í Klaksvík.

### Ikki bara ein dansur á rósum

Tað, sum eyðkennir Giggu, er hennara serstakliga positiva lyndi. Tað kom henni til góðar, tá Theodor, bert 38 ára gamal, gjørdist sjúkur av parkinson. Pensjónin tá á døgum munaði lítið og var ikki nóg stór at breyðføða einari familju.

Men Gigga fírdi ikki fyri at taka fatt og lá ikki á tí løtu síðuni.

Í nøkur ár arbeiddi hon á hotellinum hjá Erik Olsen, har hon hjálpti til við matgerð og hevði ábyrgdina av borðreiðingini.

Seinni fór hon á pylsuvirkið hjá Hans Jakku, kollfirðinginum at arbeiða. Eitt skifti bakaði hon til handlarnar at selja, og í fleiri ár hevði hon logerandi, sum tað varð rópt tá. Við hvørt búðu upp í 4 dreingir til leigu hjá teimum. Hetta vóru avbygdadreingir, sum vóru í læru ella gingu til telegrafist og á skiparaskúla í Klaksvík.


*Í morgin fyllir Gigga við Keldu í Klaksvík 90 ár*

### Fyrsta nýggja knæið

Gigga var tann fyrsta, sum fekk nýtt knæ á Klaksvíkar Sjúkrahúsi. At fara undir slíkar skurðviðgerðir her heima kravdi mót, bæði hjá læknum og sjúklingum.

Rajani, sum skuldi gera skurðviðgerðina, segði, at tað skuldi verða Gigga, ið bleiv tann fyrsta, tí hon er so positiv. Rajani visti, hvønn týdning tað hevði fyri sjúkrahúsið, at henda fyrsta skurðviðgerðin fekk góða umtalu.

Og væl dugdi læknin at velja, tí sama hvussu hevði gingist, hevði Gigga ivaleyst fingið tað positiva fram.

Seinni varð hitt knæið skift, men tað var úr plastikk. Tað vóru bert 5 mánaðir millum skurðviðgerðirnar, og eydnaðust tær báðar væl.

### Út at ferðast á gamalsaldri

Á blaðungum árum komu Gigga og Hjørdis hjá Peturi Háberg at kennast. Tær gjørdist góðar vinkonur og hevur teirra vinarlag hildið til henda dag.

Ungar í sinninum, sum tær báðar eru, lótu tær ikki aldurin ráða, men fóru á gamalsaldri út at ferðast. Tá vóru báðar um 80 ára aldur.

Fyrsta ferðin gekk til Pólands, og eitt árið gekk leiðin við bussi til París. Eisini hava tær báðar verið í summarhúsi í Danmark, har tær koyrdu um stóran part av Jútlandi í bili við Hjørdis sum bilførara.

Hjørdis sigur, at Gigga er ein einastandandi góð og trúføst vinkona.

### Fitt og lítillátin

Gigga er ein serstakliga fitt og lítillátin kvinna. Sum so nógv onnur faðir- ella móðurleys, mátti hon, sum lítil genta, út til onnur at verða. Tá vóru sosialu livi-umstøðurnar heilt aðrar enn í dag, og mong eru tey børn, sum ikki sluppu at vaksa upp heima saman við sínum systkjum.

Eitt, sum eyðkennir mong av hesum, er, at tey gera lítlan háva burtur úr sær sjálvum og vilja ongum liggja til byrði. Og júst soleiðis er Gigga. Altíð er hon við tí góða orðinum, smílandi og sera fyrikomandi.

Gigga var til trúgv á Jesus, ið hon alt lívið hevur sett sítt álit á. Saman við manni sínum og børnunum hevur hon verið samkomuni í Betesda ein stuðul og fyrimynd.

Vit ynskja Giggu og øllum hennara hjartaliga tillukku við føðingardegnum, og at Harrin má vera við henni tað, sum eftir er av róðrinum.

## 35 ára starvsdagur

Leygardagin 1. mars eru 35 ár liðin síðan Kári Hammer í Vági byrjaði sum oljusølumaður hjá Esso, sum seinni varð broytt til Statoil. Í hesum sambandi verður opið hús hjá Kára frá kl. 10 fyrrapart til kl. 15 seinnapart.

# Í starvsvenjing hjá Valdemar Lützen

STARVSVENJING
*Mortan Seyer Vistrup*

Torbjørn Lützen gongur í 10. flokki í Eysturskúlanum. Hann er í starvsvenjing hjá Valdemar Lützen, her lærir hann at ekspedera, og so sleppur hann eisini viðhvørt at avreiða kundarnar.

– Eg læri alt møguligt her. Eg læri um øll møgulig amboð, og eg læri at avgreiða kundar, og onkutíð sleppi eg eisini at koyra trukk, sigur Torbjørn.

Hann hevur úr at gera, tí handilin er ógvuliga stórur, og har eru nógvir kundar.

– Eg sleppi at gera næstan akkurát tað sama, sum hinir gera, ið arbeiða her.

Torbjørn er ógvuliga glaður fyri at vera í starvsvenjing hjá Valdemar Lützen.



*Tórbjørn Lützen við trillubørini uttan fyri handilin hjá Valdemar Lützen, har hann er í starvsvenjing*



NØVN Í VIKUNI

# Sylverius Jacobsen starvsdag á Skála Skipasmiðju

Í dag, 1. fyrsta mars, hevur Sylverius Jacobsen, smiðjumeistari, arbeitt á Skála Skipasmiðju í 33 ár. Vit høvdu frætt at hann hevði 30 ára starvsdag 1. mars, men tá vit ringdu til hann, vísti tað seg, at liðin vóru 33 ár, síðan hann byrjaði sum lærlingur á Skála Skipasmiðju í 1970. Sylverius er 49 ára gamal og leirvíkingur. Hann er føddur í Klaksvík seks tímar eftir at eineggjaði tvíburabróðurin, Marius, var føddur í Leirvík. Eftir at Marius var føddur, bleiv mamman í skundi flutt við útróðrarbátinum Gulakletti til Klaksvíkar, har Sylverius er borin í heim. Hetta var undir Halvorsensstríðnum í Klaksvík. Sylverius hevur búð á Skála síðan 1973, tá hann giftist við Sannu, fødd Berg, av Skála. Tey eiga 3 døtur og 3 ommu og abbabørn. Sylverius hevur verið limur í Javnaðarflokkinum frá ungum av, og hevur hann eisini verið uppstillaður fyri flokkin í Eysturoynni. Hann er formaður fyri Meinigheitsstýrið á Skála, og brúkar hann stóran part av síni frítíð har.



**m.g.**

# Amaliel Hansen deyður



Sunnudagin 23. februar andaðist Amaliel Hansen í Klaksvík, 73 ára gamal. Hann var ættaður úr Mikladali, yngstur av teimum 6 børnunum hjá Malenu og Jógvan í Beiti.

Amaliel búði í Klaksvík meginpartin av ævi síni. Hann fekk sær handilin Kósabúðin við fjølbroyttum úrvali av matvørum og klædnavørum og hevði handilin í mong ár. Tað gjørdist hansara lívsstarv at vera handilsmaður. Hann leitaði tó eisini aftur á slóðina og hevði hús og jørð í Mikladali.

Áhugin fyri samfelagsviðurskiftum var sera stórur. Amaliel var tjóðskaparsinnaður, hann var loysingarmaður og í mong ár virkin limur í Norðoya Tjóðveldisfelag. Eisini var hann í nøkur ár fyritaksstjóri á blaðnum 14. September.

Hann giftist í 1958 við Hansinu Højbro úr Klaksvík, og tey fingu børnini Paulu, Malenu, Elin og Jógvan.

Fyri nøkrum árum síðani fekk Amaliel ta ringu Alzheimer-sjúkuna, og tey seinastu árini var hann á Røktarheiminum í Klaksvík.

# Kári Hammer - oljuumboðsmaður í 35 ár

1. mars eru 35 ár liðin, síðan Kári Hammer í Vági bleiv umboðsmaður fyri oljufelagið Esso, seinni Statoil, í sunnaru helvt í Suðuroy. Kári, ið er føddur og uppvaksin í Vági, fór til skips sum 16 ára gamal og sigldi til 1958, tá hann fór á stýrimansskúla. Í 1960 tók hann prógv sum stýrimaður. Í 1964/65 tók hann skipsførarprógv. Í fýra ár sigldi hann í Grønlandi við einum sleipibáti hjá danska bjargingarfelagnum, EM.Z.



Switzer. Hann gavst at sigla, tá hann 1. mars 1968 yvirtók umboðið fyri oljusøluna Esso í sunnaru helvt í Suðuroy, eftir at Martin Joensen, heilsølumaður í Vági, gavst vegna aldur. Kári hevur ábyrgdina av bygdunum frá Hovi til Sumbiar. Seint í 80-unum skifti oljufelagið navn frá Esso til Statoil. Kári fegnast um at Sumbiartunnilin er komin, tað hevur ikki altíð verið so stuttligt at koyrt til Sumbiar við olju í kavaroki og ódnarveðri. Seinastu fimm árini hevur Kári, saman við konuni, Poulu, havt ábyrgdina av Statoilstøðini á Vági. Eftir at hava arbeitt hjá sama oljufelag í 35 ár, sigur Kári, sum verður 67 ár í september, at hann hevur havt tað gott, og honum dámar arbeiðið væl.

**m.g.**

# Tær hava verið sjúkrasystrar í 30 ár

**Tað eru nú liðin 30 ár síðani, at hesar fittu, ungu genturnar vóru klaktar sjúkrasystrar. Útbúgvingin byrjaði 4. august 1969 á háskúlanum, og vóru vit 18 í tali, tá vit byrjaðu og 14 í tali, tá vit vórðu útlærdar**

Nógv og góð eru minnini frá forskúlatíðini, tá vit, ungar og fullar av dreymum um lívið frammanfyri, gleddu okkum til at nema kunnleika til hetta yrki, sum vit høvdu valt.

Spennandi varð, tá vit skuldu møta á deildunum, íklæddar strípututm bláum og hvítum bummulsbúnum við flipp og sloyfu, fyriklæð og kappa. Har lærdu vit tað praktiska arbeiði í sjúkrarøktini, og at hava umsorgan fyri sjúklingunum, sum vit bert høvdu lisið um, men nú skuldi læra at røkta. Vit lærdu »teori og praksis« - hond í hond saman við ábyrgd.

Vit vóru teir fyrstu næmingarnir, sum í 1970 fluttu inn á B75 at búgva.

Køkurin varð hjartað, har vit terpaðu saman, tað verði seg medisin, kirurgi, infektiónspatalogi ella aðrar lærugreinar.

Teir seinastu átta mánaðirnar gekk leiðin til Danmarkar, har vit tóku psykiatri á Nykøbing Sjælland, barnasjúkur og oyra/nøs og háls á Sundby Hospital. Síðani komu vit heimaftur og tóku tað endaliga prógvið.

Alt hetta sjóvaði okkum saman, og hava vit nógvar glaðar og ógloymandi løtur saman, sum nú eru dýrabar minni, vit goyma í huganum.


*Sjúkrasystrarnar, sum tóku prógv á Sjúkrasystraskúla Føroya í 1973:*
*Aftast frá vinstru: Elsupa (Petersen) Hansen Sólgerð (Jacobsen) Mortensen (deyð 1996), Esmi (Jacobsen) Olsen, Sólvá Patursson (lærari), Poula Poulsen (lærari), Esther Thomsen (lærari), Rutt (Poulsen) Mikkelsen, Kristianna (Olsen) Michelsen, Jóngerð (Joensen) Poulsen, Maria (Andreassen) Anderssen. Fremst frá vinstru: Poulina Jacobsen (deyð 1993), Anna (Joensen) Jacobsen, Anna Maria (Jacobsen) Sørensen, Kirstin (Jacobsen) Jensen, Marita (Mohr) á Ryggi, Hildur (Bendtsen) við Høgadalsá, Ása (Jørgensen) Poulsen*

Tað er við sorgblídni, vit hyggja at myndini. Allar so ymiskar av lyndi og lagnurnar so ymiskar. Allar upplivað lívið við tí viðráki og mótrákið, sum tað nú einaferð hevur at bjóða. Tvær eru tíverri ikki millum okkum meira, og minnast vit tær við sakni.

Tað at kenna tykkum hevur gjørt mítt lív so nógv ríkari. Við hesum vil eg ynskja okkum tillukku við degnum og við nýggja heitinum, »sjúkrarøktarfrøðingar«, og takka fyri alt!

**Heilsan Maria**